# Skálabúðin

Skálabúðin liggur í miðbýnum í Havnini og er ein av førandi klædnahandlunum í landinum. Handilin lat av fyrstan tíð upp heilt afturi í 1945, og 11 ár seinni fekk hann navnið Skálabúðin, sum handilin eitur enn tann dag í dag.

Tá ið handilin lat upp av fyrstan tíð, seldi hann klæðir til bæði børn og vaksin – kvinnur og menn. Í dag selur Skálabúðin bert klæðir til konufólk.

Ása Østerø er ein av leiðarunum í Skálabúðina. Hon letur væl at gongdini hjá hanbdlinum.

- Jú, vit hava hampiliga nógv at gera, og eg haldi, at tað gongur bara heilt væl við handlinum. Summarmótin hjá okkum er eisini komin, so nú byrja vit spakuliga at merkja, at fólk byrja at keypa fleiri summarklæðir.

Skálabúðin selur tó ikki bara klæðir. Tey hava eisini eina gardindeild í handlinum, tey selja ymiskt til føroysk klæði, og so hava tey eitt tað størsta úrvalið av frakkum og jakkum í landinum.

- Vit munnu nokk vera ein av førandi handlunum í landinum, hvat viðvíkur sølu av frakkum og jakkum, tí vit hava eitt rættiliga stórt úrval, sigur Ása.

Skálabúðin hevur eisini eina deild fyri yngri kvinnur. Henda deildin er ikki í sama húsi sum Skálabúðin, men stendur hinumegin vegin. Hesin handilin kallast Mótaskálin.



*Skálabúðin hevur eitt tað størsta úrvalið í landinum av frakkum og jakkum til konufólk*




















